## Flaggdagshald í Føroyahúsinum





*Borreitt var við turrum fiski við eplum, kaffi og lagkøku.*
*Helga Hjørvar stjóri á Bryggjuni helt røðuna.*

Týsdagin var flaggdagshald við døgurða í Føroyahúsinum á Vesterbrogade í Keypmannahavn. Stúgvandi fult var av fólki, sum vóru komin saman til hugnaløtuna, har Helga Hjørvar helt flaggdagsrøðuna.

Eisini var felagssangur, og kórsangur á skránni. Eitt kór frá Pensionisthøjskolen sang. Danskir fólkadansarar dansaðu og at enda var farið upp á gólv við nøkrum vísum. Alt í alt eitt sera væleydna tiltak.

## Brekkubrothers nordic relation tour 2006.



Í sambandi við fløguna sum kemur í juni, fer Brekkubrothers á konsertferð í Norður Londum. Konsertferðin verður rópt Nordic Relation Tour 2006, og nú eru skráin fyri føroysku konsertirnar klár.

Í løtuni arbeiðir bólkurin við at fáa tað seinasta uppá pláss viðvíkjandi konsertunum í Danmark, Norra og Svøríki.

Brekkubrothers eru: Hans Petur í Brekkunum (saxofon), Trygvi R í Brekkunum, (slagverk), Bjarki Meitil (bass), Magnus Johannesen (rhodes).Aftrat sær hava teir hesar solistarnar: Ole Jørn Myklebust, Norra (trompet), Ólavur Olsen, Føroyar (trompet), Peter Asplund, Svøríki (trompet), Søren Bebe, Danmark (rhodes),

Vitja Brekkubroters á www.brekkubrothers.com

**KONSERTSKRÁ**

Hóskvøldið 13.juli, Atlantis, Klaksvík

Fríggjakvøldið 14.juli. Havnar Klubbi, Tórshavn

Leygarkvøldið 15. juli. Stóra Pakkhús, Vágur

Mikukvøldið 19. juli. Manhattan, Tórshavn

Hóskvøldið 20. juli. Manhattan, Tórshavn

Leygarkvøldið 29.juli. Miðlahúsid, Tórshavn

# Fáar kommunur hava gøtunøvn

**Eitt yvirlit frá Matrikulstovuni vísir, at 60 av teimum sonevndu postbygdunum hava ongar adressur. Men nógvastaðni verður arbeitt dúgliga við at finna eina loysn á hesum máli.**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Gøtunøvn:** "Sambært adressulógini (§10) skulu allar kommunur, innan tann 7. mars 2005, geva allar tillutaðar adressur upp til góðkenningar og skrásetingar í landsadressuskránni".

Hóast lógarteksturin er greiður, so er veruleikin tann, at nógvar – bæði stórar og smærri – kommunur enn ikki hava fylgt hesi lógini.

Millum hesar kommunur finna vit kommununa í Miðvági, Sunda kommunu, Tvøroyri, Runavík, Fuglafjørður og aðrar. Men sum skilst verður arbeitt við hesum málinum, og eru hesar kommunurnar komnar væl á veg í ásetingini av nøvnum á gøtum og nummarum á húsini.

Fleiri av stóru kommununum – sum t.d. Havn og Klaksvík – hava sjálvandi gøtunøvn, men her vanta ávísar rættingar, áðrenn allar adressurnar kunnu góðkennast.

Hyggur ein eftir yvirlitinum sæst, at í Norðoyggjum er tað bert Klaksvíkar kommuna sum hevur fingið hesi viðurskifti í lag, og á Sandoynni er tað bert Skálavíkar kommuna sum hevur gjørt tað sama. Í Suðuroynni hava bert vágbingar skipað viðurskifti á hesum øki.

Ein av smærru kommunum sum heldur ikki hevur fingið hesi viðurskifti í rættlag er Kunoyar kommuna, sum umfatar bygdirnar Kunoy og Haraldsund.

– Vit eru ikki komnir so langt enn, men hetta málið kemur helst fyri á komandi bygdaráðsfundi, sigur Heini O. Heinesen, borgarstjóri í stuttari viðmerking.

Hesin fundur eftir ætlan seinast í komandi mánaði.



*Hóast fáar gøtur eru í Kunoy, so ætlar borgarstjórin, Heini O. Heinesen at áseta bæ›i nøvn og nummur á húsini í kommununi*

## Oljuspill í Skopunar Havn

**2.400 litrar av gassolju fóru á sjógv í Skopunar Havn, tá ein tangabilur hjá Shell í gjárkvøldið læt Teistanum olju. Farið varð skjótast gjørligt at taka oljuna uppaftur**

OLJUSPILL
*tíðindaskriv*



*Tað var tá Teistin bunkraði, at oljan fór á sjógv*

Bilførarin á bilinum setti slanguna á inntakið til smyrjioljutangan í staðin fyri gassoljutangan, og tískil var gassolja latin í skeivan tanga. Smyrjioljutangin tekur bert 600 litrar, meðan gassoljutangin tekur túsundtals litrar, og sostatt rann olja á sjógv, tá smyrjuoljutangin, sum fyltist skjótt, var fullur.

Bæði Strandferðslan og P/F Føroya Shell boðaðu beinanvegin frá oljuspillinum, og Sløkkiliðið í Havn fór til Skopunar at royna at taka oljuna uppaftur saman við fólki á staðnum.

P/F Føroya Shell harmast óhappið og sambært reglum, sum eru galdandi fyri alt Shell-samtakið, verður sett í verk ein innanhýsis kanning av óhappinum. Shell hevur ein strangan umhvørvispolitikk, og slíkt verður tikið í sera stórum álvara.

## Kvinnur í kommunalpolitikk

**Ì morgin 27. apríl verður kommunalpolitiskur fundur á Oyrarbakka**

FUNDUR
*tíðindaskriv*

Fundurin verður fyri øllum teimum kvinnum, sum stillaðu upp til kommunuvalið í 2004. Av teimum 250 uppstillaðu hetta árið eru 51 valdar og sita í dag í bý- og bygdaráðunum kring landið. Av hesum 51 eru 6 borgarstjórar.

Tað er politiski kvinnubólkurin á tingi, sum skipar fyri. Í honum sita tær trígjar fólkavaldu tingkvinnurnar umframt kvinnulig umboð fyri hinar politisku flokkarnar, sum ikki hava fólkavalda kvinnu í tingbólkinum.

Tá ið fundurin er fyri kvinnum, sum hava víst kommunalpolitiskan áhuga til seinasta val, er endamálið við fundinum, at hesar kvinnur fáa kunning og kjak um kommunalpolitiskar ætlanir við denti á uppgávubýtið millum land og kommunur.

Kl. 19.00 byrjar Eyðun Christiansen frá Føroya Kommunufelag at røða um fíggjarpolitiskar fyritreytir fyri broyttum uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur.

Síðandi fer Ingibjørg Berg frá Kommunusamskipan Føroya at røða út frá einum politiologiskum sjónarvinkli um kommunala sjálvræði í sambandi við nýggja kommunuskipan og nýtt uppgávubýti millum land og kommunur. Og sum tann triðji kemur landsstýrismaðurin Jacob Vestergaard at greiða frá kommunalpolitisku støðuni og ætlanum við uppgávubýtinum millum land og kommunur. Eftir kaffisteðgin verður kjak sum Marjun Kálvalíð kemur at stýra.